Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Hjálparpakki til festivalar

Spurningar:

1. Nær kunnu tónleikafestivalar vænta at fáa hjálparpakka fyri festivalar, sum vórðu avlýstir í summar?
2. Hvat er ætlanin at veita festivalunum endurgjald fyri?

Viðmerkingar:
Fleiri tónleikafestivalar eru aftur í summar avlýstir, tí støðan við koronu hevur verið óviss, og tí tilmælini frá landsstýrinum hava verið, at bara 500 fólk kundu savnast. Sostatt hava festivalar annað árið á rað mist inntøkur.

Tann 8. juli í ár boðaði løgmaður frá í fjølmiðlunum, at landsstýrið arbeiddi við sama hjálparpakka, sum festivalarnir fingu í fjør, og at hesin møguliga skuldi kunngerast sama dag. Síðani hevur einki verið at frætt um hetta mál. Tí verða hesir fyrispurningar settir.

Á Løgtingi, 4. august 2021

Beinta Løwe Jacobsen